# Politiskur fundur í SMS

POLITIKKUR
*Tíðindaskriv*

Í London hava tey ”Speakers Corner”, har meinigi maðurin ella kvinnan kann siga sína hugsan fyri eini ávísari mannfjøld uttan onnur hjálpartól enn einum ølkassa úr træi og sínari egnu rødd.

Mikudagin 24. apríl verður líknandi tiltak á Torginum í SMS. Tá verða tað tó fleiri av okkara kosnu politikarum og valevnum til løgtingsvalið 30. apríl, sum fara at royna seg. Og sum í London eru einastu hjálpitólini ein trækassi – ikki ein ølkassi, tí teir eru ov torførir at fáa hendur í, men ein sodavatnskassi frá Føroya Bjór, og síðan røddin. Um hon er hjálpartól ella ikki, fer helst at vísa seg seinni. Haraftur-at skulu teir eisini hava floksbókstavin í hondini. Kanska verður hetta hjálp hjá tí ella teimum, sum ivast í, hvar krossurin skal setast, tá farið verður á val týsdagin 30. apríl.

Eitt umboð úr hvørjum flokki hevur játtað at luttaka á hesum serliga og øðrvísi politiska fundinum.

Óli Breckmann fyri Fólkaflokkin, Heðin Mortensen fyri Sambandsflokkin, Hendrik Old fyri Javnaðarflokkin og Torbjørn Jacobsen fyri Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin hava ikki enn upplýst, hvør umboðar teir. Fundurin verður skipaður soleiðis, at valevnini fáa trý umfør at siga tað, tey hava upp á hjartað. Umførini eru ávíkavist fimm minuttir, tríggjar minuttir og ein minutt. Fara teir út um ásettu talutíðina, verða teir sektaðir.

Politiski fundurin verður mikudagin 24. apríl kl. 16.00, og vónandi verður Torgið stúgvað við áhugaðum og forvitnum áhoyrarum.

# Gribbar á Oyrargjógv

**Verkfallið, sum hevur lagt strandfaraskipini, hevur rættiliga fingið lív í teir, sum vilja vinna nakrar krónur við at flyta fólk um sundini. Prísurin liggur millum 50,- og 100,- krónur fyri at sleppa um Vestmannasund**

FLUTNINGUR
*Edvard Joensen*


*Kapping er um feðrafólkini við ferjuleguna á Oyrargjógv*

*Mynd: Edvard Joenen*

**Oyrargjógv:** Tá flogrutan frá Maersk flogfarinum kom á Oyrargjógv fyrrapartin sunnudagin, vóru eisini seks ymisk fartoy við bryggjuna, klár at flyta fólk yvi á Vestmanna.

Alt frá smáum speedbátum umvegis vanligar útróðrarbátar til ferðafólkabátar við góðkenning til 28 ferðafólk.

Ymsastaðni frá tykjast teir eisini vera komnir. Merktir bæði TN og SA. Men flestir kortini úr Vestmanna, skiltist.

Ymiskt varð, sum hildið var um trygdina. Men flestu tóktust á einum máli um, at avgjørt ikki allir áttu at fingið loyvi at farið um sundið við ferðafólki yvirhøvur.

Og ymiskur er prísurin eisini. Teir »etableraðu« tóku 50,- krónur fyri hvørt ferðafólkið um vikuskiftið, meðan aðrir vildu hava tað dupulta. Vanligi prísurin við Ternuni er 30,- krónur.








# Heimbygdin mintist Martin Joensen

**Stórfingið hátíðarhald var í Sandvík fríggjakvøldið, tá skipað varð fyri kvøldsetu at minnast høvundin og sandvíkingin Martin Joensen á 100 ára degnum. Minnissteinur var fluttur á fríðkað øki og forvitnisligir fyrilestrar vóru á skránni**

MARTIN JOENSEN 100 ÁR
*Orð og myndir:*
*Dagfinn Olsen*


*Nógv fólk høvdu leitað sær til Sandvíkar at taka lut í hátíðarhaldinum Martini Joensen til minnis*

Hátíðarhaldið Martini Joensen til minnis og heiður, byrjaði við, at bygdaráðsformaðurin í Hvalbiar sókn, Levi Niclasen, formliga lat sandvíkingum nýfríðkaða økið í Geilini, har minnissteinur um Martin Joensen nú er settur. Hann stóð áður við skúlan, men er nú sjónligari.

Levi Niclasen hugleiddi millum annað um serstaka sandvíksmálið, ið hann metti er um at fara fyri bakka, og hann takkaði teimum, ið so dyggiliga høvdu tikið undir, tá hugskotið um at fríðka økið og flyta steinin, kom fram.

## Barnaheimið

Rættiliga nógv fólk var komið saman í Sandvík. Sjálvandi mangir suðuroyingar, men tað hevði eisini eydnast at fáa fólk um Suðuroyarfjørð, hóast verkfall. Eisini nógvir sandvíkingar, ið eru setstir niður aðrastaðni, vitjaðu heimbygdina hetta kvøld.

Ein teirra var lærarin og skaldið Steinbjørn B. Jacobsen. Hann fekk orðið, eftir Levi Niclasen. Hann hugleiddi og mintist afturá. Millum annað helt hann økið í Geilini hóska sera væl til minnissteinin, tí tað var her, barnaheimið hjá Martini stóð. Síðani bar hann fram yrkingina, ið hann skrivaði, tá Martin andaðist jóladag í 1966. Steinbjørn nýtir sum mynd í yrkingini landslagið í Sandvík.

Eftir hetta endaði fyrsti parturin av hátíðarhaldinum við, at sungin var sangurin Landið eg bar við mær, ið Karsten Hoydal, vinmaður Martins, yrkti.

## Lívsleið og samtíð

Síðani varð farið inn í Ranhøll, har fyrilestrar, felagssangur, ábit og føroyskur dansur vóru á skránni. Lagamenn spældu afturvið felagssanginum.

Hanus Kamban, høvundur, helt nærlagdan og áhugaverdan fyrilestur um ævisøgu Martin Joensen. Hann metti, at góður lærari hevur verið í Sandvík í skúladøgum Martins, tí seinni á Háskúlanum og á Læraraskúlanum var hann ofta havdur á munni, sum dugnaligur næmingur. Lærari í Sandvík tá var Theodor Dahl og tey høvdu tá eisini føroyskt í skúlanum, hóast hetta ikki var vanligt allastaðni tá á døgum. Rikard Long heur seinni skrivað um Martin, at hann er besti næmingur, ið hann hevur havt á Læraraskúlanum.

Hanus umrøddi mannin, lívleið og samtíð. Hann umrøddi skaldskapin, tær báðar skaldsøgurnar og tey fýra stuttsøgusøvnini.

Hann greiddi frá, at Martin var virkin í Javnaðarflokkinum og var blaðstjóri á Sosialinum í 3 og eitt hálvt ár. Hann greiddi somuleiðis frá, at Martin í Sosialinum fegnaðist, tá tað, sum var spírin til tann mentanarpolitikk, vit síggja í dag, kom fram. Í 1946 fegnast Martin í blaðgrein, tá løgtingið setur á stovn mentanargrunn.

Hanus segði, at Martin var dugnaligur lærari og ta løtuna sóust fleiri eldri fólk, óivið næmingar hjá Martini, nikka samtykkjandi.

Álvur Enni, lærari, las fyrilestur, ið pápi hansara, Jóhannes Enni, helt fyri 20 árum síðani. Millum annað varð komið inn á, at Barnablaðið var við til at fáa gongd á skrivingina hjá Martini.

Ein av fyrireikarunum, Rannveig Hovgaard, las síðani søguna Jólagásin.

## Framsýning

Eftir ábit og føroyskan dans, høvdu fólk høvi at vitja gomlu bóndahúsini, og í skúlanum skipaði Landsbókasavnið og onnur fyri framsýning.


*Hanus Kamban helt fyrilestur um Martin Joensen, lívsleið og samtíð. Hanus segði, at Martin var dugnaligur lærari og ta løtuna sóust fleiri eldri fólk, óivið næmingar hjá Martini, nikka samtykkjandi*


*Álvur Enni las fyrilestur, ið pápi hansara skrivaði um Martin Joensen fyri 20 árum síðani*


*Steinbjørn B. Jacobsen bar fram yrking og hugleiddi. Í minnisyrkingini um Martin Joensen nýtir Steinbjørn sum mynd landslagið í Sandvík*


*Levi Niclasen flytur fram røðu*